## Hundakapping

Leygardagin 14. apríl verður seyðahundakapping við Gjógv, og hetta er tann fyrsta kappingin har av hesum slagnum. Kappast verður í trimum bólkum, og byrjað verður miðskeiðis í Gjáardali kl. 10 fyrrapartin. Dómari er Hans Joensen. Tríggir teir bestu hundarnir í hvørjum bólki fáa steyp og heiðursmerkir, og steypini, sum Føroya Shell hevur latið, verða handað á Gjáargarði eftir lokna kapping. Tá verður eisini okkurt leskiligt at fáa.

## Munnkurv

Tey, sum arbeiða hjá donsku stórfyritøkuni A.P. Møller-Mærsk, sleppa ikki at siga hvat sum helst, tá tey skulu siga okkurt fyri almenninginum. Tað kom týðiliga til sjóndar nú um dagarnar, tá blaðið Søfartens Ledere hevði fingið nøkur starvsfólk hjá A.P. Møller-Mærsk at úttala seg um ymisk viðurskifti. Tað vísti seg, at eitt umboð fyri fyritøkuna hevði "rættað" og broytt orðaljóðið, áðrenn tað kom í blaðið, so innihaldið hóvaði leiðsluni.

# arnir eru í minking



frá mathøgguslokki hanga í reiðskapinum.

### Ungur fiskur

Fiskifrøðingurin heldur, at við tí stóra veiðitrýsti, sum er undir Føroyum, vil tilgongdin av ungfiski tey einstøku árini í stóran mun gera av, hvussu stórur stovnurin er. Stórur partur av stovninum er nevniliga ungur fiskur.

- Bæði stovnur og veiða vilja av hesi orsøk vera skiftandi ár undan ári, tí tilgongdin er skiftandi, og vøksturin á fiskinum hevur sjálvandi eisini týdning fyri, hvussu stór samlaða stovnsvektin er.

Hann sigur, at í vár eru toskurin og hýsan hampuliga væl fyri til fiti, meðan upsin yvirhøvur er rakari.

Í talvu í frágreiðingini hjá Jákupi Reinert sæst, hvussu skjótt toskastovnurin kom fyri seg aftur eftir tey vánaligu kreppuárini, og var orsøkin teir sera góðu árgangirnir árini 1992 og 1993. Hesi árini vaks hýsan eisini skjótt, og 1993 og 1994-árgangirnir skaraðu fram úr.

- Góð tilgongd síðani hevur eisini fingið allar tríggjar stovnarnar at vaksa aftur, men sambært nýggju kanningunum eru teir allir í minking. Serliga er toskurin illa fyri og hevur alla vernd fyri neyðini. Júst, hvussu nógv toskastovnurin er minkaður, er trupult at gera av bert við støði í hesum kanningum.

Hann sigur, at toskur savnast á ávísum avmarkaðum leiðum at gýta, og fellur hetta saman við teimum úrvaldu kanningarstøðunum, verður veiðan samsvarandi stór.

- Vit høvdu eini 2-3 rættiliga stór toskahál í 2005, og er hetta orsøkin til, at linjurnar í talvuni hetta árið kvinkaðust uppeftir. Eingi tílík stór hál hava verðið síðani, sigur fiskifrøðingurin.

### Frið at veksa

Hann vísir á, at ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar um einar tvær vikur, kann aldursbýtið í stovninum roknast, og soleiðis fær Fiskirannsóknarstovan tá eina neyvari ábending um støddina á nýggju árgangunum.

- Men umráðandi er, at smáfiskurin fær frið at vaksa, so minkingin serliga í toskastovninum kann steðga, og stovnurin við tíðini eisini kann veksa. Fyri hýsu kvinkaðist linjan eitt sindur upp í ár, og helst er høvuðsorsøkin vøkstur á fiskinum í vekt.

Fiskifrøðingurin heldur, at stóra minkingin fyri upsa, sum vísti seg í yvirlitstrolingunum í vár, kann stava frá lítlum fiskavøkstri, men sannlíkt er, heldur hann, at vánaliga veðrið eisini hevur havt sína ávirkan.

- Tølini fyri upsa skulu takast við stórum fyrivarni, tí slíkar yvirlitstrolingar vísa seg at vera rættiliga óneyvar fyri upsa. Hetta kemst av, at upsi ofta gongur í torvum, og at eldri upsi ofta fer upp í sjógvin, sigur Jákup Reinert.



- Við tí stóra veiðitrýsti sum er, fer tilgongdin av ungfiski tey einstøku árini í stóran mun at gera av, hvussu stórur stovnurin er. Tí verður veiðan eisini skiftandi ár undan ári, sigur Jákup Reinert, sum hevur verið toktleiðari við Magnusi Heinasyni hesar báðar túrarnar

*Mynd: Rógvi Mouritsen*




*- Eg havi valt at kalla trolbátin upp eftir pápa mínum, Jens Leon, sála, sigur Jónsvein Knudsen, reiðari*

Jónsvein Knudsen, reiðari:

## Eg kallaði bátin upp eftir pápa

**Jónsvein Knudsen, reiðari eigur trolbátin, Jens Leon, sum hann hevur valt at kalla upp eftir pápa sínum, Jens Leon, sála, sum doyði fyri umleið 20 árum síðan**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*Myndir: Vilmund Jacobsen*

- Eg ætlaði at "trappa" niður, men havi sagt við Meinhard Jacobsen, stjóra í Faroe Seafood, at eg kann taka mær av skipunum, sum felagið eigur og eigur saman við øðrum, í eina tíð.

Tað sigur Jónsvein Knudsen í Saltangará, sum eftirhondini er gamal í garði sum reiðari og skipaeigari.

- Eg eigi Jaspis og Ametyst saman við teimum og trolbátin, Jens Leon, eigi eg einsamallur. Jens Leon er upprunaliga trolbáturin, Sæborg, sum leirvíkingar áttu. Báturin er smíðaður í Íslandi, er trý ára gamalur og er sum nýggjur.

Umframt Bak og Stelk, sum Faroe Seafood eigur, byggir felagið tveir nýggjar trolarar í Spaniu, sum verða klárir til fiskiskap í summar.

Eftir at Faroe Seafood keypti P/F Beta, eigur felagið tvey veiðiloyvi aftrat – umframt skipini, sum nú verða smíðaði í Spaniu, og herfyri fingu vit at vita, at felagið hevur samráðingar um skipakeyp í Írlandi og Skotlandi.

**Jens Leon**

Hann liggur so vakur og nýmálaður millum túrarnar við bryggju í Saltangará.

Navnið er Jens Leon og mangur, sum ikki hevur sína dagligu gongd á bryggjuni í Saltangará, man hava spurt seg sjálvan, hvaðani navnið stavar.

- Sum eg nevndi, eigi eg henda bátin sjálvur, og hetta er soleiðis eisini fyrsta skipið, eg eigi einsamallur. Tí kann eg nú gera, sum eg vil og havi valt at kalla trolbátin upp eftir pápa mínum, Jens Leon, sála, sigur Jónsvein Knudsen, reiðari.

Foreldrini hjá Jónsveini eru Jens Leon og Mina, men pápin doyði fyri umleið 20 árum síðan.

- Tað hevur gingið rættiliga væl hjá Jens Leon, síðan eg keypti bátin fyri umleið einum ári síðan. Trupulleikin er bara, at hesir bátar hava so fáar fiskidagar, og við uppaftur fleiri avmarkingum, sum kanska eru væntandi, er spurningurin, hvussu tað verður í framtíðini, sigur Jónsvein Knudsen.

Við Jens Leon eru 5 mans, og skipari er Jóhan Djurhuus av Selatrað.



*- Tað hevur gingið rættiliga væl hjá Jens Leon, sum man teljast millum bestu bátar í sínum bólki, sigur skipaeigarin*